VIÐMERKINGAR

# Besta framtíðartryggingin av føroyska vælferðarsamfelagnum er ein framhaldandi høgur føðitíttleiki

**- Tað vil siga ein góður familjupolitikkur. Og tí eru allar skerjingar av barnsburðargrunninum onki annað ein samfelagslig dáragerð, um man hugsar longur enn beint fram um nøsina.**

**Hans Pauli Strøm**
*samfelagsfrøðingur*



Vit verða fleiri og fleiri gomul í komandi árum. Men eg eri ikki samdur við teimum, sum tosa um, at tey nógvu gomlu fara at verða ein so ovurtung fíggjarlig byrða hjá teimum, sum eru í arbeiðs-førum aldri, at tað verður størsta hóttanin móti føroyska vælferðarsamfelagnum. Eg royndi at grundgeva fyri hesum í greinini í Sosialinum síðsta leygardag, men har vóru so nógvar villur komnar í og brot dottin burturúr, at eg má bøta um tað við hesum ískoyti.

Tað er ikki nøkur sjálvsøgd demografisk ella íbúgvafrøðilig gongd, sum skapar nakrar trupulleikar. Tað avgerandi er hinvegin eitt politiskt val, um umstøðurnar hjá barnafamiljunum skulu gerast betri ella verri. Fáa smábarnafamiljurnar góðar umstøður, eru betri møguleikar fyri eini sunnari, sterkari fólkasamanseting. Verða umstøðurnar gjørdar verri, ja so fáa vit so líðandi eina gamla, aldursliga avskeplaða fólkasamanseting, sum kann elva til stórar fíggjarligar trupulleikar.

Tí er tann besta sosiala og fíggjarliga framtíðartryggingin av føroyska vælferðarsamfelagnum at vit framhaldandi megna at halda ein høgan føðitíttleika.. Hetta leggur nevnliga eitt sterkt og trygt støði undir fólkasamansetingini í Føroyum.

Nú eru vit so heppin, at okkara føðitíttleiki liggur nógv hægri enn í hinum norðanlondunum og í Europa yvirhøvur, og tann stóra avbjóðingin er halda fast við henda høga føðitíttleikan eisini í komandi árum. Men tað hendir ikki av sær sjálvum. Altjóða rákið hevur longi verið eitt minkandi barnatal, har eittbarna familjur verða tað vanliga. Skulu vit sleppa undan somu gongdini her, er tað av allarstørsta týdningi, at trivnaðarligar og fíggjarligar umstøður hjá ungum smábarnafamiljum eru so góðar, sum yvirhøvur gjørligt. Og alt sum ger umstøðurnar verri, fer at hava negativa ávirkan á føðitíttleikan.

Tí ivist eg ikki í, at verri umstøður í samband við barnsburð fara at enda við einum lækkandi føðitíttleika. Tað gevur við tíðini eina "gamla" fólkasamanseting. Tá kunnu vit enda í hesi óhepnu støðuni við einum veksandi fíggjarligum trýsti móti væl-ferð-arskipanunum.

Vit kunnu lýsa avleiðingarnar av einum minkandi føðitíttleika við at samanbera tvær framrokningar. Onnur er framrokningin hjá Hagstovuni (Alternativ FØ), har fyritreytin er ein høgur føroyskur føðitíttleiki, hóast hann minkar nakað (úr 2,5 niður 2,2 børn pr. kvinnu). Hin framrokningin (Alternativ NO) er at føðitíttleikin líðandi verður minkaður niður á sama støði, sum er miðaltalið fyri øll norðanlondini (altso úr 2,5 niður 1,7 børn).

Framrokning av f lkatali 2003-2043

| Aldur | 2003 | Alternat Ffl 204 | Alternat˚ NO 204: | V¿kstu Altern. | V¿kstu: Altern. I |
|---|---|---|---|---|---|
| 00-19 r | 14.62 | 16.60 | 12.50 | 1.98 | -2.12 |
| 20-64 r | 26.74 | 33.17 | 31.87 | 6.43 | 5.13 |
| 65 og eldri | 6.33 | 11.75 | 11.73 | 5.41 | 5.39 |
| Tilsamans | 47.70 | 61.53 | 56.11˚ | 13.82 | 8.40 |

*Alternativ FØ: Framrokningin (frá grein síðsta leygardag) við høgum føroyskum føðitíttleika*

*Alternativ NO: Framrokning har føðitíttleikin minkar niðar á miðal norðurlendskt støði*




Tað sum talvan og myndin vísa, er hvussu nógv vit vinna við at fasthalda ein høgan føðitíttleika – ella hinvegin, hvussu galið tað kann ganga, um okkara føðitíttleiki minkar niður á eitt miðal norðurlendskt støði. Tann altavgerandi munurin, sum sæst væl í stabbamyndini, er at við tí høga føðitíttleikanum veksur talið av teimum yngru enn 65 ár næstan dupult so nógv sum av teimum eldri enn 65 ár. Í hinum førinum – við tí minkandi føðitíttleikanum – verður umvent, har fer talið av teimum yngru bert at veksa helvtina av teim eldru. Ongin kann verða í iva um, hvat er betur fyri samfelagsligu menningina.

# Harðskapur ímóti kvinnum

**v/ Kvinnuhúsið Elin Reinert Planck**



»Tað eru bert ávísar typur av kvinnum, ið verða útsettar fyri harðskapi«. Líknandi mytir eru partvís viðvirkandi til at bagatellisera harðskap ímóti kvinnum, og partvís fjalir tað út-yvir hvussu umfatandi trupulleikin í veruleikanum er.

Kvinnur, útsettar fyri harðskapi, eru at finna í øllum samfelagsløgum. Eins væl tann vælútbúna kvinnan, sum tann kvinnan við ongari útbúgving, eru fyri harðskapi.

Verður kvinnan ofta útsett fyri harðskap – likamligum, sálarligum ella hóttanum – ávirkar tað hennara sjálvsvirði. Tað kensluliga sambandið við mannin, skommin av at verða bundin at honum og skommin av ikki at hava orku til at leysríva seg, ávirkar sjálvsuppfatanina hjá kvinnuni. Við harðskapinum fylgir ofta avbyrging frá familju og kenningum.

Hon er 31 ár. Í átta ár var hon verandi í einum harðligum parlagi.

Hon kom av bygd, hann úr býnum. Fyrstu ferð hon hitti hann, kendi hon atdráttarmegina – hann var spennandi og øðrvísi.

Tá hon lýtur aftureftir vóru frá byrjan fleiri tekin um, hvussu hann veruliga var. Hon varnaðist ikki t.d. hansara ævinsjúku, at hann stýrdi henni og altíð skuldi vita, hvar hon var.

Hann sýndi hóttandi atburð frá byrjan, t.d. tók hann fleiri ferðir hart í hana. Hon varð ógvuliga bangin og royndi at verja høvdið, um hann, sum hann hótti við, slerdi høvdið í veggin.

Einaferð tey vóru í eini familjuveitslu, rópti hann í ævinsjúku yvir, at hon dansaði við einum systkinabarnið: Fert tú heim við honum?

Eitt annað tekin var, at hann gjørdi alt fyri, at hon ikki var saman við vinfólki. Seinni forbjóðaði hann henni at hava samband við tey flestu av teimum.

Hon helt ikki, at hon var harðskapsrakt, tí hann slóð hana ikki so ofta. At tað var sálarligur harðskapur, sá hon seinni og vendi sær til ráðgeving fyri harðskapsraktar kvinnur, har hon eisini fekk at vita, at hon var ikki tann einasta ið hevði livað í einum harðskapsraktum paralagi.

# Endalig viðmerking til Randi

**Óli Jacobsen**

Tað er altíð ein fyrimunur at seta seg inn í viðurskifti, ein úttalar seg um. Tað hevur Randi í Jógvanstovu ikki gjørt. Hon hevur heldur ikki spurt.

Í hennara fyrra "glepsi" leggur hon meg undir at vera fíggindaligan móti útlendskari arbeiðsmegi. Verunleikin er tann, at eg havi "bert" arbeitt fyri, at fólk, sum hava verið í starvi á sama arbeiðsplássi í upp til 15 ár, ikki skulu troðkast burtur av útlendingum, sum annars bert eru sett tíðaravmarkað. Hetta er, sum eg skilji tað, fult í samsvar við støðuna hjá FA, sum eg annars í dag einki útistandandi havi við, sum tað verður róð uppundir av Randi.

Tá Randi hevur rent seg fasta her, nýtir hon gomul "tricks", nevniliga at tosa um nakað annað, sum hon heldur ikki hevur sett seg inn í, og enn minni spurt um. Hetta er nevniliga sáttmálan fyri polakkar.



Her skal stutt sigast, at hesin sáttmáli er samráddur av ITF, altjóða fakfelagið fyri m.o. sjófólk. Hetta er helst besti sáttmáli, sum er gjørdur í heiminum fyri polakkar, og hann gevur um eitt ár somu løn og frítíð sum til føroyingar.

Tann sum vil vita meira um hetta kann fara inn á heimasíðuna: www.fiskimannafelag.fo

Her ber til at leita seg fram til útkomin FF-bløð. Í blað nr. 296 er ein frágreiðing um júst hetta mál.



# Bókadagur og jólamarknaður í Keypmannahavn

## Úr skránni hjá Føroyahúsinum í Keypmannahavn

KEYPMANNAHAVN
*tíðindaskriv frá Føroyahúsinum*

Sera nógv tiltøk eru í novembur í húsinum. Eisini feløgini uttanum hava nógv til samans, so ríkiligt er at fara til: Listaframsýningar, fyrilestrar, upplestrar, sjónleikur, jólamarknaður og gudstænastur. Harafturat alt tað, sum danskarar hava at bjóða. So neyvan eru stundir til alt.

### Bókadagurin 16 novembur

Hesu ferð fara landsbókavørðurin Martin Næs og debattørurin Kim Simonsen at seta teirra sermerkta dám á dagin, sum hevur fjølbroytta skrá. Kim fer at taka eitt sera áhugavert evni upp, sum er beinleiðis eitt boð um okkum útisetar og okkara mentan og ta broyting, sum hon elvir til hjá hvørjum einstakum.

### Skráin fyri bókadagin

Kl. 14.00: Bókaframsýningin opnar
Kl. 15.00: Vit bjóða væl komin og byrja ummælini.
Kl. 15.10: Martin Næs landsbókavørður hugleiðir um føroyska bókaútgávu
Kl. 15.25: Hans Pauli Torgarð ummælir verkið hjá Marianne Clausen: Føroya Kvæði - Løgini/Melodies
Kl. 15.40: Kingosálmar. Bólkurin við Hans Paula Torgarð, Hugin Eide, Súsannu Torgarð og Eygunn Hansen syngja nøkur kingoløg
Kl.16.00: Kim Hansen heldur fyrilestur við heitinum: Millum eksil og heimloysi. Um føroyskar útisetar, um útisetamentan og ta broyting, hetta skapar fyri einstaka menniskja
Kl. 16.50: Hugin Eide ummælir yrkingasøvnin i hjá Alexander Kristiansen, Tóroddi Poulsen og Oddfríði Rasmussen
Kl. 17.10: Stuttfilmurin: Mowing North, Regin smiður. Fótatraðk dansar
Kl. 17.20: Listafelagið skipar fyri aktión. Tey hava nakrar málningar, sum skula seljast. Heini Davidsen er aktionarius. Vit hava eisini nakrar bøkur til sølu hendan dagin
Kl.17.45 - 19: Høvi at keypa sær góðan sunnudagsdøgverða við dessert og kaffi, sum kokkurin ger til. Kostnaður 100 kr.

### Bingo og jólamarknaður

Bingo sum gekst væl tey fyrru árini, hevur ikki havt so góða undirtøku tvey tey síðstu árini. Men nú tykist aftur at bera til. Avlopið frá bingokvøldunum fer til raksturin í Føroyahúsinum. Aftanfyri bingo stendur Bingofelagið Føroyahúsinum til frama. Ein og hvør kann vera limur.

Týsdagin 18. novembur verður aftur bingo við fjølbroyttum vinningum. Tær tríggjar Rigmor, Sólklár og Anna hjálpa til saman við Georg. Stóri vinningurin hesu ferð verður ein ferð fyri tvey við bili við Norrønu til Føroya.

Týsdagin eftir ella 21. novembur er døgverðin bótasúpan við turrum fiski, spiki og eplum, kaffi og køku. Samtíðis er jólamarknaður, har fólk kunna bíleggja sær borð og hava sølulutir frammi frá kl. 15 – 20. Vit leiga eitt slíkt borð fyri 50 kr. Tað plaga at vera eini 6 – 10 seljarar slíkan dag við ymsum jólaskreyti o. ø. Tá fara vit at jólast. Gløgg og holukøka at fáa allan dagin.

### Erotiskur leikur og kafé

Uppímillum men alt ov sjáldan er sjónleikur á skránni. Vit hava ongan leikpall og kanska eru eisini aðrar grundir til at hesi halda seg aftur. Men nú hevur Gunnvá Zachariassen og Marita Dalsgaard boðið sær til at framføra ein leik, sum er úr stuttsøgu hjá William Heinesen. Tær nevna leikin: Syndefaldet – En historie om et virkelig godt menneske. Hetta er ein intimur leikur ella erotikkin er frammalaga í honum.

Leikurin verður framførdur tvær ferð fríggjakvøldið 21. novembur í stovuni á 1. hædd, sum verður við ljósum og øðrum rekvisittum lagað til hóskiliganleikpall.

Samtíðis verður kafékvøld í kaffistovuni, har AnnaMatrio spælir. Tey eru Anna Maria Olsen, Rókur Jacobsen og

### Talvfelagið í 1. deild

Tað eydnaðist føroyska Talvfelagnum í Keypmannahavn at koma upp í 1. deild. Hetta var eitt bragd av teimum. Einki annað ikki danskt felag hevur nátt hetta mál. Men so eru eisin i boð eftir teimum: Leikir skula spælast, ferðast skal um alt landið og tað er ikki ókeypis. Tí stendur felagið fyri dansinum leygardagin 29. novembur har teir báðir navnframu menninir Eyðun Nolsøe og Pætur við Keldu spæla saman við vinmonnum. Slíkir dansir plaga at kasta fitt av sær til feløgini og Føroyahúsið, sum er karmur fær sítt.

### Bryggjan letur dyrnar upp

Tað vikuskifti verður eisini mangt annað á skránni, nú Bryggjan letur upp. Hósdagin 27. novembur verður tann hátíðarligi dagurin við drotningini, forsetum, ministarum og løgmanni og øðrum fólki. Leygardagin 29. og sunnudagin 30. verður almenningurin boðin at koma at síggja hesi valahúsini í fimm hæddum. Føroyar hava fjórðu hædd, sum er sera nýtímans innrættað, ljós og snøgg, men eisini øðrvísi í sniði og innrætting, enn vit eru von við.

Føroyahúsið verður liggjandi, her vit eru, men í góðum samstarvi við Bryggjuna og serstakliga føroyska partin. Hesar dagarnar skula vit lata nkað nógv av sneisabitum og føroyskum øli at bjóða væl komin við. Eisini fara Føroyahúsið saman við grønlendska og íslendska húsinum at handa teimum eina gávu, sum er ymist á skránni leygardagin 29. novembur seinnapartin.

# Álendska fuglaveiðan helst bannað av ES

**Heri Simonsen**



Tað hevur verið skrivað og talað nógv seinastu tíðina, um hvørt vit skulu kanna møguligar fyrimunir og vansar við einum føroyskum ES-limaskapi ella ikki. Ein tann besti hátturin, er at granska tey samfeløg, ið eru meinlík okkara samfelagi. Áland líkist okkum á mangan hátt. Oyggjabólkurin millum Finnland og Svøríki, sum hoyrir til finska ríkið hevur eina stødd, og eitt fólkatal, ið minnir nógv um okkara. Ríkisrættarliga líkist londini eisini, talan eru um tvey "sjálvstýrandi øki", sum Føroyar, Áland og Grønland verða nevnd í norðurlendskum høpi.

### Búsetingar síðan Steinøldina

Forngrevstir í Álandi vísa, at har hava fólk búleikast líka síðani Steinøldina. Hesir forngrevstir prógva eisini, at álendingar hava veitt fugl líka síðani Steinøldina. Áland er sostatt sum samfelag fleiri øldir eldri enn tað føroyska. Men ein felagsnevnari fyri bæði samfeløgini hevur so verið fuglaveiðan. Skrivligar keldur frá 15. øld greiða eisini frá fuglaveiðini á Álandi. So her talan um ein avgerandi tátt í søgu og samleika álendinga. Og stutt eftir, at álendska sjálvstýrislógin kom í gildi í 1921, samtykti álendska tingið eina veiðulóg. Og alt síðan 1920-ini hava álendingar samvitskufult virka fyri at friðað fugl, og ásett veiðukvotur tá tørvur hevur verið á hesum. Bert undir krígnum bleiv ránsveiða framd, men tað var av neyð og mattroti.

### "Vårfågeljakten"

Álendingar nevna sína fuglaveiðu: "Vårfågeljakten". Maj-mánaði er háárstíðin fyri hesi veiðu. Álendingar útskriva uml. 4.200 veiðuloyvi árliga, har álendskir menn og kvinnur so skjóta fugl undir greiðum og skipaðum lógum og reglugerðum. Og soleiðis verður hesin aldargamli álendski siður hildin í hevd, enn! Men nú er stórur vandi fyri, at hesin aldargamli siður verður burturbeindur av ES. Hetta hóast Áland hevur havt regluligar fuglateljingar síðan 1930-árini, og eingin ránsveiða er farin fram í Álandi síðani krígslok í 1945. Alt hetta verður at rokna fyri einki, tí nú hava teir tiltiknu umhvørvisaktivistarnir (vit kenna teir!) kært "Vårfuglaveiðina" hjá Álandi til alvaldandi ES-kommisjónina. Higani er málið beint í ES-rættin, ið hevur sætið í Luksemburg.

### Vaknaðu við kaldan dreym!

Álendingar vaknaðu soleiðis við kaldan dreym í vár, júst sum teir høvdu glett seg til at fremja fedranna sið í "Vårfågeljakten". Størsta tíðindablað álendinga: "Tidningin Åland", sum hevur eitt upplag uppá 10.758 bløð má turt konstaterað í oddagreinini hjá Jan Helin, blaðstjóra 2. maj 2003: "Åland tog en risk då man vid EU-inträdet utgick från att den åländska jaktlagen var förenlig med EG-rätten. Man blottade sig därmed för sänare tolkningar. När sedan aktivister, okunniga om Ålands viltvård annmälde Åland til EU-kommisionen var den olyckliga siuation vi i dag befinner oss i ett rättsligt faktum.". Ríkisrættarliga er Áland tikið við brøkrunum niðri, samstundis, sum tað hevur eydnast umhvørvisaktivistunum at leggja hesa snaru fyri søgu- og siðvandu álendingunum.

### Kunnu ikki verja seg, sjálvir!

Og tað, sum verri er: Álendingar sleppa ikki sjálvir at verja seg í hesum stóra álvarsmáli. Tá man bert er eitt "sjálvstýrandi øki" sleppur ein ikki til borðs saman við teimum stóru í ES. Álendingar eru soleiðis tvungnir at líta á Finnland, ið hevur fingið leiklutin at verja Áland í ES-rættinum í Luksemburg. Í brævið datomerkt 6. oktober 2003 skrivar "Ålands Landskapsstyrelse" - landsstýrið - til løgmálaráðið í Helsinki: "Åland har inga möjligheter att själv föra sin talan i EU-domstolen i denna typ av ärenden, eftersom det är medlemsstaterna som är EU-kommisionens motpart i frågor som rör överträdelser av medlemsförpliktelserna enligt artikel 226 i EU-fördraget." Ella sagt við øðrum orðum: bert sjálvstøðug lond eru limir í ES! Hevði t.d. føroyskt grindadráp verið klagað til ES-kommisjónina høvdu føroyingar ikki sloppið at vart seg sjálvar í ES-rættinum í Luksemburg. Finski veiðumaðurin og ES-tingmaðurin Ilkka Suominen verjir tó Åland. Í "Tidningen Åland" 15. maj 2003 sigur hann: "Vi jägare värnar mer om naturen och viltet än vad asfaltgänget i storstäderna gör." Hesum kunnu allir føroyingar bert taka undir við. Men røkkur hetta, sum argument yvir fyri ES-kommiserum og ES-dómarum?? Neyvan! Hesar ringu royndirnar hjá Álandi eiga at verða okkum ein læripeningur. Annars hevði tað verið uppá sítt pláss, at eitt samt Løgting og Landsstýrið lýsti sín fulla stuðul til álendska landstýrið og álendska løgtingið í hesum álvarsmáli.

P.S. Gev gætur: Hvalaveiða er bannað í øllum ES-limalondum!